STARVSLÝSING

# Búskaparfrøðingur

Søkt verður eftir einum búskaparfrøðingi at starvast á fíggjardeildini fulla tíð.

**Um fíggjardeildina**

Fíggjardeildin hevur ábyrgd av at fyriskipa og samskipa fíggjarligu viðurskiftini á stovninum. Fíggjardeildin hevur eftirlitið við, at játtanirnar halda, ráðgevur leiðsluni og hinum deildunum á stovninum um innanhýsis fíggjarstýringina og ger ymisk hagtalsyvirlit til stovnin og aðrar almennar myndugleikar. Harafturat umsitur Landsverk íløgur og viðlíkahaldsuppgávur fyri onnur ráð.

Stovnurin hevur eisini ábyrgd av at gera samfelagsbúskaparligar útgreiningarnar í sambandi við íløgur og viðlíkahald og at menna fíggjarstýringina í sambandi við verkætlanir og rakstrarætlanir. Tí søkja vit eftir einum búskaparfrøðingi, sum skal vera við til at menna hetta arbeiðsøkið uppaftur meira.

Á deildini starvast fimm fólk, og tú kemur at vísa beinleiðis til fíggjarleiðaran.

**Arbeiðsøkið**

Sum búskaparfrøðingur kemur tú at hava ábyrgdina av:
- at gera costbenefit-kanningar og -frágreiðingar
- at vera við til at menna fíggjarstýringina á stovninum
- at vera við til at menna fíggjarstýringina av stovnsins verkætlanum og rakstrarætlanum
- herundir at gera disponeringsroknskapir
- at vera við til at gera fíggjarlógararbeiðið fyri avvarðandi ráð
- at menna hagtalsgrundarlagið

Tú kemur eisini at luttaka í øðrum arbeiðsuppgávum hjá deildini, t.d. dagliga fíggjareftirlitinum, hagtalsarbeiðinum og ársroknskapargerðini.

**Førleikakrøv**

Vit sóknast eftir einum fólki við viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, t.d. cand. polit, cand.merc. HD(R) ella líknandi.

Vit vilja røkka best møguligum úrslitum og vænta tí, at tú sýnir arbeiðssemi, dugnaskap og nærlagni. Vit leggja stóran dent á góðar persónligar eginleikar, at tú arbeiðir sjálvstøðugt, ert ein arbeiðsglaður viðleikari við góðum samstarvsevnum og málbert teg væl, bæði skrivliga og munnliga.

**Setanarviðurskifti**

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**

Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo ella til:
Landsverk
Postmoga 78
FO-110 Tórshavn
og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. juni 2008. Merk umsóknina „Umsókn-Búskaparfrøðingur" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Árant Andriasson, fíggjarleiðara, á 540 821 ella aa@lv.fo.

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallarmál, herundir tyrlupallar.*

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

## HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

22 50 00

TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ



VIVA

Vikuskiftisvaktin hjá

**SOSIALINUM & PORTALINUM**

er at hitta alt vikuskiftið á

**TELEFON 22 50 00**

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum

VIVA

Føroya Symfoniorkestur

# FØROYA SYMFONIORKESTUR
# 25 ÁR




Í sambandi, við at tað 19. juni eru 25 ár síðan Føroya Symfoniorkestur bleiv stovnað, verður móttøku í Norðurlandahúsinum henda dagin frá kl. 14 - 17.

Tað vildi glett okkum at sæð so mong, sum til ber av tykkum, sum gjøgnum árini á ymsan hátt hava stuðlað orkestrinum - áhoyrarum, sponsorum og øðrum, ið hava gjørt tað møguligt at hava eitt Symfoniorkestur í Føroyum.

Høvi verður at bera okkum eina heilsan.

Limir í orkestrinum, lærarar og næmingar í Føroya Musikkskúla spæla tónleik.

**Føroya Symfoniorkestur**